# Kalsoy fær nú samband við meginøkið

**Týsdagin í næstu viku verður hátíðarhald á Syðradali, tá nýggja samferðsluhavnin verður tikin alment í nýtslu. Í hesum sambandi skipar Landsverk fyri móttøku**

SAMFERÐSLA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Syðradalur, Kalsoy:** Tað verður hátíðardagur í Syðradali, tá gestir í hópatali koma í oynna týsdagin.

Hesi seinastu tvey árini hava fólk kunnað fylgt við arbeiðinum at gera samferðsluhavnina lidna.

Eftir ætlanini skuldi arbeiðið verða liðugt í desember í fjør, men orsakað av veðri, kann hon fyrst nú takast í nýtslu. Kostnaðurin fyri arbeiðið er 21 mió. kr. hóast hesar seinkingarnar.

Nú samferðsluhavnin er liðug er kortini eftir at asfaltera atkomuvegin og økið, har bilar skulu standa. Hetta verður gjørt í næsta mánaði.

## Røður og fýrverkarí

Hátíðarhaldið týsdagin byrjar kl. 15:10, tá strandferðsluskipið Sam leggur at í nýggju samferðsluhavnini. Tað verður eisini hetta skipið sum í framtíðini fer at røkja sambandið millum Kalsoynna, Leirvík og Klaksvík.

Á havnaøkinum verða síðani hildnar fleiri røður. Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, fer fyrst at lata Strandferðsluni samferðsluhavnina til nýtslu, áðrenn umboð fyri Strandferðsluna bera fram eina heilsan.

Síðani fær landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Bjarni Djurholm, orðið. Hann sker snórin og er samferðsluhavnin tá alment tikin í nýtslu.

Magni Garðalíð, borgarstjóri í Húsar kommunu, verður seinasti røðarin og ætlar hann m.a. at bjóða øllum, sum eru komin at hátíðarhalda nýggju samferðsluhavnina, til døgurða um kvøldið á Húsum.

Tá røðurnar eru hildnar, bjóðar Landsverk breyð við føroyskum viðskera og okkurt afturvið. Breyðið verður keypt frá skótunum í oynni.

Barskor, sum hevur siglt á Syðradal í mong ár, fer at liggja við bryggju, og høvi verður hjá fólki at fara umborð. Tey, ið hava áhuga fyri tí, fáa eisini møguleika at sigla seinasta túrin við Barskor, tá hann saman við Sam umleið fer av aftur Syðradal seinni um kvøldið. Tá fara eisini Klaksvíkar og Húsar kommunur at heilsa skipunum báðum við fýrverkaríi.

Eini 200 fólk væntast at taka lut í hátíðarhaldinum.



*Samferðsluhavnin á Syðradali er nú liðug*





# Starvsfólk til Blika

**Blika er ein fyritøka í menning og vøkstri. Vit eru nú átta fólk – og hava tørv á einum afturat til tess at betra um tænastuna.**

Nýggja starvið fevnir um avgreiðslu av viðskiftafólki, bíleg-ging og móttøku av vørum og annað fyrifallandi í sølubúðini og á goymsluni.

Tú verður okkara álit inneftir og okkara andlit úteftir. Tí sóknast vit eftir einum dugnaligum og nærlagdum fólki, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Vit lova tær eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum í einum stuttligum og mennandi umhvørvi.

Hevur tú læru/royndir innan handil og/ella goymslu kann hetta vera ein fyrimunur, men tað er eingin treyt.

Starvið verður sett skjótast tilber, men vit bíða fegin eftir rætta fólkinum.

Løn eftir avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Send skrivliga umsókn við CV til T-postadressu: beinir@blika.fo ella til Blika spf., Postrúm 316, 110 Tórshavn í seinasta lagi hósdagin 21. apríl.

Vilt tú frætta nærri um starvið, ring til Beinir á tel. 55 66 66.

Blika

Blika spf. er 12 ára gomul heilsasøla við 8 starvsfólkum. Blika letur vørur um alt landið við egnum vørubili Blika umboðar og selur fyri m.a.

KATRIN® NOVADAN® Nilfisk Advance

Blika spf., Akranesgøta 9, Postrúm 316, 110 Tórshavn, Tel. 35 66 66, Fax. 35 66 67, www.blika.fo, blika@blika.fo.

Heildarveitan innan reinføri

